## Fólk við gikt hugna sær

Giktafelagið hevur hugnakvøld í MBF húsinum í kvøld, mánakvøldið. Hugnakvøldið byrjar klokkan 19.30 og tá fer Eva M. Holm, sjúkrarøktarfrøðingur, at greiða frá um giktaheiluvág og aftaná svarar hon spurningum um evnið. Men jólamánaður er og tí bjóðar Giktafelagið ein drekkamunn, gløgg og holukøkur. Tiltakið er alment.



## Samstarva um tyrlur

Norsku og íslendsku myndugleikarnir hava skrivað undir ein samstarvssáttmála, sum millum annað sigur, at tey bæði londini skulu í felag virka fyri at finna bjargingartyrlur, sum egna seg best til tørvin hjá londunum báðum. Endamálið við samstarvinum er at tryggja, at bjargingartænastan á havleiðini millum Noreg og Ísland er so góð og trygg, sum til ber. Tey bæði londini ætla sær eisini at samstarva beinleiðis, tá tað snýr seg um at keypa tyrlur.

# – Hetta má kannast til botns

**Landsstýrismaðurin í almanna-og heilsumálum skilir púra onki av, at pensjónistar nú knappliga ikki longur skulu fáa avsláttur, tá ið teir ferðast við tyrluni hjá Atlantsflogi og hann fer nú at kann málið til botns**

PENSJÓNISTAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hans Pauli Strøm sigur, at fyribils góðtekur hann ikki frágreiðingina um, hví pensjónistarnir nú knappliga ikki longur sleppa at flúgva bíliga við tyrluni hjá Atlantsflogi og hann vil hava málið kannað til botns*

- Hetta góðtaki ikki uttan víðari og tí má tað kannast til botns.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna og heilsumálum, skilir púra onki av, hví pensjónistar nú knappliga hava mist avslátturin, sum tey í nógv ár hava fingið, tá ið tey hava ferðast við tyrluni hjá Atlantsflogi. Hetta kanst tú lesa um í aðrari grein í Sosialinum í dag.

Hann sigur, at hetta er ikki eitt mál, sum Almannastovan hevur havt ávirkan á, tí hetta er eitt stig, sum Atlantsflog hevur tikið av sínum eintingum.

Men í fyrstu syftu er hann ikki sinnaður at góðtaka frágreiðingina frá Atlantsflogi.

- Hatta takið eg ikki fyri góða vøru, sum landið liggur nú og tí fari eg beinanvegin mánamorgunin at seta fólk í umsitingini á málið og at fáa tað kannað til botns.

Hann skilir ikki, hví einskiljingin av Atlantsflogi skal hava kostað pensjónistunum avsláttúrin við tyrluni.

- Tað fái eg illa at passa og fyribils taki eg hatta ikki sum eitt nøktandi svar, sigur hann.

### Sær ongan samanhang

Hann staðfestir, at tað er ikki meiri enn ein triðingur av Atlantsflogi, sum er einskildur og tí heldur hann fyribils, at tað er óskiljandi, at hetta skal kosta pensjónistunum avsláttur.

- Eg fái ongan samanhang í, hvussu spurningurin um at einskilja ein triðing av Atlantsflogi kann hava samband við, at pensjónistarnir missa avsláttúrin.

Hann sigur, at í sambandi við at málið verður kannað, fer hann eisini at ringja til landsstýrismannin í vinnumálum, sum umsitur Atlantsflog og biðja hann fáa greiði á, hvussu einskiljing kann rættvísgera, at pensjónistarnir missa avsláttúrin.

- Vit mugu fyrst fáa eina grundgeving frá Atlantsflogi og tá ið vit hava fingið hana, verður hon løgd fyri landsstýrismannin í vinnumálum fyri at vita, hvat talan er um.

- Møguliga liggur ein haldgóð frágreiðing krógvað onkustaðni, men so mugu vit fáa hana undan kavi, men fyribils eri eg ikki sinnaður at góðtaka avgerðina um at taka avsláttúrin frá pensjónistunum, sigur Hans Pauli Strøm

Hann ásannar, at avsláttúrin við tyrluni hevur sera stóran týdning fyri pensjónistarnar á útoyggj, tí hjá nógvum av teimum er tyrlan álitið.

- Á útoyggj er nógv eldri fólk, so hetta rakar tey ómetaliga meint, sigur Hans Pauli Strøm.

# Taka avsláttur frá pensjónistum

**Serliga eru pensjónistar á útoyggj hart raktir. Eftir øllum at døma er tað einskiljingin av Atlantsflogi, sum nú gevur pensjónistum ein frammaná**

PENSJÓNISTAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Nú um dagarnar fingu pensjónistar nýtt avsláttarkort frá Almannastovuni, men feitari tussj er strikað út, at tey eisini hava rætt til avsláttur, tá ið tey ferðast við tyrluni hjá Atlantsflogi. Serliga rakar hetta pensjónistar á útoyggjunum hart*

Í nógv ár hevur ein skipan verið galdandi, har pensjónistar fáa 50% í avsláttri, tá ið teir ferðast við Strandferðsluni, Bygdaleiðum og tyrluni hjá Atlantsflogi.

Sum prógv um, at teir hava rætt at ferðast fyri hálvan prís, hava pensjónistarnar fingið sendandi avsláttarkort frá Almannastovuni, sum teir skulu vísa fram, hvørja ferð, teir keypa ferðaseðil á einum skipi hjá Strandferðsluni, einum bussi hjá Bygdaleiðum ella við tyrluni.

Nú um dagarnar hava pensjónistarnir aftur fingið nýtt avsláttarkort sendandi og tað hevur fingið nógvar pensjónistar at undrast.

Tað, sum serliga hevur ørkymlað teir, er, at nú stendur bara á kortinum, at tað gevur 50% í avsláttri Frá Strandferðsluni og Bygdaleiðum.

Hinvegin er tað strikað út við svartari tussj, at tey eisini hava fáa til avsláttur við tyrluni.

Tað er rættiliga dýrt at ferðast við tyrluni, afturímóti við Strandferðsluni og bygdaleiðum og tí er hetta nakað, sum rakar pensjónistar rættiliga meint.

Serliga rakar hetta pensónistar á útoyggj hart. Á útoyggjunum er vanliga myndin tann, at har er stór yvirvág av eldri fólki og pensjónistum. Samstundis hevur tyrlan ógvuliga stóran týdning fyri ferðasambandi hjá útoyggj við meginøkið, tí ferðamannaskipini sigla sjáldan, eru lítil og ofta er veðrið ótespuligt.

Tað hevur gingið strilti at finna útav, hví pensjónistarnir nú brádliga hava mist avsláttúrin við tyrluni.

Men tað, vit fyribils hava fingið uppspurt, er, at tað er Atlantsflog, sum av sínum eintingum hevur tikið avsláttúrin av og hevur givið Almannastovuni boð um hetta.

Almannastovan hevur so borið boðini víðari til pensjónistarnar og hevur sent teimum nýtt asvláttarkort, har tað er strikað út, at tey eisini hava rætt til avsláttur við Atlantsflogi.

Tað, vit hava fingið at vita, er, at frágreiðingin, sum Atlantsflog hevur uppgivið, er tann, at nú felagið er einskilt, ber ikki til at hava eina slíka avsláttarskipan.